LM-067/2022

fylgiskjal 21.

Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás September 2021

Hoyringsvar til løgtingslóg um náttúruvernd

Føroya náttúru- og umhvørvisfelag og Ringrás fegnast um, at tað aftur verður arbeitt við eini náttúruverndarlóg, og vit viðmæla at samtykkja hana tó við nøkrum tillagingum, sum vit meta vera neyðugar fyri at lóggávan skal hava nakran reellan týdning og virkan fyri náttúru- og umhvørvisvernd framyvir.

Svinnið í lívfrøðiliga margfeldinum tekur ferð á seg, vill plantu- og djórasløg doyggja út í minsta lagi 10-100 ferðir skjótari, enn tey hava gjørt í miðal tey síðstu 10 milliónir árini og mett verður, at umleið ein million plantu- og djórasløg eru í vanda fyri at doyggja út tey næstu áratíggjuni, um gongdin ikki verður vend[1]. Doyr eitt slag út, kemur tað aldrin aftur. Haraftrat hevur svinnið í lívfrøðiliga margfeldinum álvarsamar fylgjur fyri matframleiðslu, menning av heiligvági, búskapin o.s.fr.

Í Føroyum eru eisini stovnar av djórum og plantum í minking og sambært føroyska reyðlistanum frá 2005 eru fleiri plantur og djór hótt. Summi eru longu útdeyð. Samstundis vita vit, at føroyska náttúran hevur ein grundleggjandi týdning fyri okkara búskap, gevur okkum mat á tallerkin, umframt at geva okkum sálarbót. Tað hevur tí ein eyðsæddan týdning, at vit fara væl um lívmargfeldið og seta í verk eina náttúruverndarlóg.

Viðmældar tillagingar:

1. Tað er óheppið, at kapittul 2 í tí gamla uppskotinum er tikin heilt burtur, tí tað var við at staðfesta, at alt samfelagið, bæði landsmyndugleikar, kommunur, vinna og einstaklingar skulu taka náttúruna við í huga, tá ið avgerðir verða tiknar. Hetta var eitt gott og framsøkið prinsipp, sum nú er tikið burtur. Mælt verður staðiliga til at taka hetta brotið við í nýggja uppskotið. Aðrar týdningarmiklar ásetingar eru tiknar úr gamla uppskotinum og mett verður, at hesar broytingar eru vansi fyri náttúruna.
    a. Tað er umráðandi, at hædd verður tikin fyri heildartrýstinum á vistskipanirnar, tá inntriv skulu gerast. Eitt inntriv ger ikki neyðturviliga skaða á eina vistskipan, men samanlagt kunnu fleiri ymisk inntriv saktans hava stóran skaða á eina vistskipan – eisini hóast tey hvør sær eru at meta sum smá. Metast má tí um heildartrýstið, sum vistskipanirnar eru ella verða fyri, tá ætlan er at byggja út ella at gera onnur inntriv í einum øki.
    b. Almennar avgerðir, sum viðvíkja náttúrumargfeldinum skulu byggja á vísindaliga fatan. Hetta eigur at verða staðfest í náttúruverndarlógini.

[1] IPBES (2019): Global assessment report on biodiversity and ecosystem services of the Intergovernmental Science-Policy Platform on Biodiversity and Ecosystem Services. https://doi.org/10.5281/zenodo.3831673

2. Tað átti at verið staðfest, at náttúruverndarfelagskapir eru hoyringspartar í náttúru og umhvørvisverndarmálum. FNU og Ringrás ynskja framhaldandi og í enn størri mun at vera hoyringspartar og at luttaka í arbeiðsbólkum í samband við mál, ið hava týdning fyri og kunna viðføra avleiðingar fyri umhvørvi.

3. Vernd av vátlendi og mólendi eigur at verða nevnd í uppskotinum. Í sunnum mólendum upptaka mosi og aðrar plantur koltvíiltu úr atmosferuni til plantuvøkstur. Tá planturnar doyggja, verða tær ikki brotnar niður orsaka av váta lendinum. Planturnar verða harvið til mógv og goyma eina rúgvu av koli í jørðini. Um inntriv verða gjørd í hesi øki, eitt nú drening av økinum, hava tey við sær útlát av koltvíiltu. Mólendi eru somuleiðis av stórum týdningi fyri lívfrøðiliga margfeldið, tí summi sløg av fuglum og plantum trívast bert í hesum slagi av lendi.

4. Landsstýrisfólkið hevur ov stórt vald at loyva undantøkum. Orðingar so sum "tá ið týðandi samfelagsáhugamál gera tað neyðugt, kann landsstýrismaðurin kortini geva loyvi til virksemið" verða nevndar rættiliga ofta uttan at nágreina, hvat talan er um. Haraftrat er einki krav sett um vísindaliga prógvbyrðu, tá undantøk skulu gerast. Hetta heldur er krav sett til vísindaliga prógvbyrðu, tá undantøk skulu gerast. Hetta gevur landsstýrisfólkinum ov nógv vald. Tískil kann ynskti virknaðurin av náttúruverndarlógini detta niður fyri millum ásettu virðini í kapittul 1. og skyldur landstýrismannsins. Verður hetta ikki batað, kann vandi vera fyri, at virknaðurin av náttúruverndarlógini í ov stóran mun avhongur av virkninum hjá landsstýrismanninum.

5. Uppskotið nevnir einki um tær altjóða skyldur og sáttmálar, sum Føroyar hava tikið undir við. Hetta átti av verið tikið við í lógina.

6. Náttúruverndarlógin ásetur ikki í nøktandi mun, hvussu gransking skal fremjast fyri at tryggja hóskandi, samanhangandi yvirlit yvir gongdina í føroysku náttúruni, soleiðis at metast kann um, annaðhvørt miðini í lógini verða hildin. Vavið á slíkum kanningararbeiði er avmarkað av, hvussu nógv fígging verður sett av til tess. Tískil er tað neyðugt at tryggja, at samsvar er millum skyldurnar hjá eftirlitsmynduleikanum, og fíggjarliga og vísindaliga førleikan at fremja hetta arbeiði á røttum støði.

Aðrar viðmerkingar:

1. Árhus sáttmálin: Føroyar eiga at taka undir við Árhus sáttmálanum, eins og okkara grannalond hava gjørt, tí hetta hevði styrkt munandi um fólkaræðisligu mannagongdirnar, tá avgerðir verða tiknar.